# Stríðsmaðurin og grannin Karl Johansen farin

Tíðliga fríggjamorgunin hyggi eg út gjøgnum vindeyga út á Nólsoyarfjørð, sum er fastur táttur á morgni. Í grannalagnum, niðri í Vørðsluni, síggi eg, at flaggstongin hjá Karl ber Merkið á hálvari stong.

Hvørjum mundi hann flagga fyri? Sera dátt komu boðini løtu seinri um, at Karl sjálvur var farin. Vit báðir tosaðust við dagin fyri, men sum orðatakið sigur, ongin veit á morgni at siga, hvar hann á kvøldi gistir.

Karl Johansen var føddur í Havn tann 3. januar 1935, hann gjørdist sostatt 67 ára gamal.

Vit eru grannar og hava verið tað, síðan eg sum smádrongur flutti til Havnar. Sjálvt um Karl var nakað eldri enn eg, so hevur tað ongantíð skilt okkum báðar. Karl var ein góður forsprákari og dugdi so sera væl at skipa fyri, tá ið nakað skuldi gerast í grannalagnum. Abbatrøð, Vørðslan og Glaðsheyggur hevur verið samlingsstað hjá okkum, sum eru uppvaksin her.

Hvør minnist ikki Vørðsluna, sum tá var okkara fótbóltsvøllur og miðdepil hjá viðhaldsfólki hjá B36, og vit høvdu vøllin hjá Traber, har eisini krokk varð spælt, og so høvdu vit Frúutrøð, tann grøna blettin, áðrenn nakað varð bygt har. Har var besta skreiðiplássið á vetri.

Á Glaðsheyggi, har gamla "sand- og kolasølan" var fyrr, høvdu vit í ártíggju eitt tað størsta bálið, sum var í Havnini á nýggjárinum, og tað var millum annað Karl, sum skipaði fyri hesum. Vit dreingir frøddust um tiltøkini og samanhaldið, sum var á Abbatrøð.

Tíðin gekk, vit komu til mans og hava framvegis bústað í grannalagnum. Børnini hjá okkum eru komin nógv saman upp gjøgnum tíðina, og hjá báðum okkara hava børn sett búgv aftur í grannalagnum.

Í mínum arbeiði sum býráðslimur og landspolitikari kom eg at hava nógvar og positivar løtur saman við Karl. Hann var ein vitigur og góður maður at spyrja til ráðs, tað veri seg innan sáttmálar og lógarsmíð, alt sum hevði nakað við dagligdagin hjá okkum øllum at gera. - Karl sat sum varalimur í fleiri valskeiðum í Tórshavnar Býráð, og tað varð altíð lurtað væl eftir, tað hann tosaði. Hann var sum sagt sera væl inni í øllum viðurskiftum.

Nógv kundi verið tikið fram um Karl hjá Talis. Karl var ein góður og trúfastur maður, hann legði alla sína orku í felagsarbeiðið hjá Havnar Arbeiðsmannafelag. Hann vildi, at korini hjá hansara limum skuldi vera góð, og sat hann sum formaður í Havnar Arbeiðsmannafelag í 25 ár. Hann er nokk tann formaður, sum hevur myndað formanspostin á ein serligan hátt. Ikki hava verið nógvir arbeiðissteðgir í hansara tíð. Hann hevur næstan altíð kunnað samráðst seg til nýggjar sáttmálar. Og tað krevur hegni og sín mann.

Í samrøðu í Útvarpinum herfyri hoyrdu vit eisini, hvussu væl Karl dugdi at siga frá sínum uppvøkstri og sínum lívi. Bæði sum útróðrarmaður, sjómaður, arbeiðsmaður og fakfelagsformaður. Hann hevði m. a. siglt við trolara í Íslandi og Grønlandi. Veit eisini at Karl sigldi við Affa, verfaðir.

Karl dugdi so sera væl at siga frá søgum og hendingum. Kongabrúgvin var jú staðið, har alt hendi fyrr í tíðini. Undir neystunum varð tosað um útróður, sigling ella hendingar á keiini.

Karl arbeiddi hjá Balslev, sum helt til á havnaøkinum, áðrenn farið var niðan til Hoyvíkar. Hann hevur í heili 38 ár koyrt og borið mangan farmin til umbygging og nýbygging av húsum runt alt landið.

Ikki vardi tað meg, at Karl, sum tann 16. desember í fjør hátíðarhelt 25-ára dagin sum formaður í Havnar Arbeiðsmannafelag, skuldi fara so skjótt frá okkum. Hann boðaði tá frá, at nú skuldi hann hava meira tíð saman við sínum kæru.



Næstan hvønn dag um middagsleitið, tá farið var til døgurða, sóust vit á Hoyvíksvegnum. Góvu okkum tíð til eitt lítið prát ella vinkaðu til heilsan, tá ið vit møttust. Nú verður onkið prátið okkara millum meira, Karl hevur heilsað og sagt farvæl fyri seinastu ferð. Saknurin verður stórur hjá okkum, sum kendu Karl.

Góði Karl takk fyri góð minnir. Jesus veri við tær.

Í djúpari samkenslu við tær Thea, børnum og verbørnum, abbabørnum og næstringum fara eg at lýsa frið yvir minnið um vinmannin, grannan og stríðsmannin Karl Johansen.

***Heðin Mortensen***
***við familju***

Døgurðatímin á Fiskavirking á Toftum:

# Arbeiðsfólkið vil – ikki feløgini

**Tað verður eingin matarsteðgur á Fiskavirking á Toftum fyribils. Døgurðatímin verður óbroyttur, og fólk noyðast framvegis at arbeiða til klokkan 17 í staðin fyri til klokkan 16.10, sum skotið varð upp. Ein meiriluti av arbeiðsfólkinum valdi hesa loysn, men feløgini siga nei.**



*Birgir Nónsgjógv, virkisleiðari á Fiskavirking á Toftum, heldur tað vera spell, at so lítil mál verða gjørd til prinsippmál hjá feløgunum, tí her er tað arbeiðsfólkið, sum velir sín egna "innrætning" á arbeiðsplássinum*

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Eftir øllum at døma verður døgurðatímin hjá arbeiðsfólkinum á Fiskavirking á Toftum ikki broyttur til matarsteðg fyribils. Hetta er greitt eftir fund, sum hevur verið í Arbeiðsmannafelagnum á Toftum. Enn hevur leiðslan á virkinum á Toftum ikki fingið skrivliga svarið uppá brævið, ið sent var lokala felagnum og meginfelagnum, FA. Men arbeiðsfólk og álitisfólk, sum vóru við á fundinum, siga, at felagið vil ikki góðtaka, at arbeitt verður til kl. 16.10, so kaffisteðgirnir hjá arbeiðsfólkinum fyri og eftir døgurða kunnu verða 15 minuttir í staðin fyri 10, sum leiðslan metir er órealistiskt.

### "Bólturin" nú hjá feløgunum

Birgir Nónsgjógv, virkisleiðari, sigur, at leiðslan saman við álitisfólkunum hevur gjørt sítt uppskot, sum ein meiriluti av arbeiðsfólkinum hevur góðtikið, men nú felagið ikki vil ganga sínum egnu limum á møti, liggur "bólturin" hjá teimum.

– Vit mugu bara ásanna, at felagið góðtekur ikki at ganga sínum egnum limum á møti, og tískil verður døgurðatímin ikki broyttur til matarsteðg, so fólkið sleppur ein lítlan tíma fyrr til hús — ikki fyribils í hvussu er.

Birgir heldur tað vera spell, at eitt so lítið mál verður gjørt til eitt prinsippmál hjá feløgunum, tí her er tað arbeiðsfólkið, sum velir sín egna "innrætning" á arbeiðsplássinum.

– Eg haldi tað vera stórt spell, at feløgini í slíkum føri skulu síggja arbeiðsgevaran sum sín "fígginda" og ikki við-part. Haldi, at feløgini í størri mun skuldu hugt inn í seg sjálvi. Mær vitandi vil eingin føroyskur arbeiðsgevari "útnytta" arbeiðsfólkið, soleiðis sum feløgini tykjast bera ótta fyri, tí tey halda seg missa okkurt.

### Ikki nøkur óhøvisk loysn

Spurdur, um tað kann hugsast, at okkurt annað uppskot um at broyta døgurðatíman til matarsteðg kemur á borðið í næstum, sigur virkisleiðarin, at tað væntar hann ikki.

– Hetta var eitt uppskot, sum leiðsla og álitisfólk gjørdu í felag, og sum ein meirilutu av arbeiðsfólkinum samtykti. Hetta var ikki nøkur óhøvisk loysn. So, nú haldi eg, at limirnir noyðast at hyggja uppá sítt egna felag, sigur Birgir Nónsgjógv og vísir á, at fyribils verður eingin broyting í døgurðatímanum.

Uppskotið hjá leiðsluni og álitisfólkunum var at hava ein matarsteðg millum kl. 12 og 13 uppá 20 minuttir, 15 minuttir kaffisteðg fyri døgurða og 15 minuttir eftir døgurða. Men fyri at gera hesa loysn møguliga, er neyðugt hjá arbeiðsfólkinum at arbeiða til kl. 16.10, so tey ikki missa inntøku. Tíðin eftir kl. 16.10 hevði so verið yvirtíð.

Men hetta verður nú av ongum.

†

**Jona Joensen,**
fødd Tómasson

andaðist leygardagin 16. februar, 74 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr Betesda í dag kl. 13.00.

*familjunnar vegna*
***Malvinus***

Tey, ið vilja minnast Jonu, kunnu lata Zarepta eina peningagávu, konto í peningastovnunum.

## Tøkk

Øllum tykkum,
sum á ymiskan hátt mintust

***Jógvan Hansen***

ta tíðina hann lá lágt og fylgdu honum
til hansara síðsta hvíldarstað her,
og øllum tykkum, sum mintust okkum,
sum eftir sita í hesu tíð,
takka vit so hjartaliga

Harrin lønir tykkum

familjunnar vegna
***Halldóra***



Narkomálið:

# Tann fyrsti fyri rættin

**Ein 33 ára gamal maður við bústaði í Havn kom mánamorgunin fyri Føroya Rætt ákærdur fyri at hava keypt og selt fleiri enn 10 kilo av hassji. Maðurin er ákærdur fyri brot á revsilógina og á lógina um euforiserandi evni**



*Tann fyrsti maðurin í stóra narkomálinum verður førdur í Føroya Rætt. Hann er m.a. ákærdur fyri at hava keypt og selt 10 kilo av hassji*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

RÚSEVNI
*Stefan í Skorini*

Maðurin er í fyrsta lagi ákærdur fyri at hava keypt 10 kilo av hassji frá einum seljara í Havn í tíðarskeiðnum frá januar 2000 til 16. januar 2002 við sølu fyri eygað. Síðani skal hann hava selt hassjið og latið seljaranum, ið eisini varð tikin 16. januar og enn situr varðhaldsfongslaður, ein part av vinninginum.

Í øðrum lagi er hann ákærdur fyri at hava havt 482 gramm av hassji í bústaðinum, sum hann skal hava keypt frá sama seljara og hevur havt ætlanir um selja víðari.

Ákærin krevur, at hald verður lagt á tey 482 grammini av hassji og tær 7.950 krónurnar, ið løgreglan fann í bústaðinum. Harumframt krevur hann, at hald verður lagt á teir lutir, sum løgreglan fann í bústaðinum, tá hon gjørdi húsarannsókn har tann 16. januar. Hetta eru lutir sum hassjpípa, dartpílur, tendrarar, sum hava verið nýttir at roykja við, og tvær vektir.

Ákærin krevur eisini, at hald verður lagt á vinningin av hassjsøluni, sum hann metir er einar 460.000 krónur.

Ákærin vildi hava rættarfundin fyri afturlatnum hurðum, og hetta hevði verjin ongar viðmerkingar til. Dómarin metti eisini, at rættarfundurin skuldi vera fyri afturlatnum hurðum, tí kanningararbeiðið hjá løgregluni í øðrum líknandi málum ikki er liðugt enn.

Ikki fekst at vita, um tann ákærdi játtaði seg sekan í hesum ákærum. Tó er greitt, at maðurin hevur játtað seg sekan í nøkrum av skuldsetingunum.

# Tjóðveldisfólk settu stevnu

POLITIKKUR
*Solby A. Eliasen*

Evnið var komandi løgtingsval og búskapur, fiskivinna og sosialmál fekk nógva umrøðu á ársfundinum hjá Tjóðveldisflokkinum, sum varð hildin í um vikuskiftið.

Eini 100 limir og áhugaði úr øllum valdømum høvdu sett stevnu Klaksvíkar, har Tekniski Skúli var karmur um framløgur, orðaskifti og veitslu.

Leygarmorgunin var pallborð, har Jóan Pauli Poulsen búskaparfrøðingur viðgjørdi blokkin og árinið av honum upp gjøgnum 90 ini. Sjúrður Guðjónsson, fiskivinnufrøðingur legði sínar tankar fram um fiskivinnuna, og hvørjar møguleikar hann sá fyri vøkstri og meira dynamikki innan høvuðsvinnu føroyinga.

Og Jancy Biskopstø, leiðari á Sosialu Deild í Klaksvík lýsti støðuna innan sosial viðurskifti í Føroyum, um tað almenna og kommunala býti og hvussu størri lógirnar innan sosialmál áttu at verði framdar í verki, soleiðis at hesar betri tæntu einstaka borgarunum.

Eisini legði formaðurin í Tjóðveldisflokkinum, Høgni Hoydal á fundinum fram eitt uppskot til ein faktafaldara, sum luttakarnir høvdu møguleika at viðgerða og koma við nýggjum hugskotum til.

Ársfundurin endaði við stórari veitslu leygarkvøldið, har Contrybólkurin úr Klaksvík spældi til dans langt út á morgunin.

# Fleiri ferðsluóhapp

LØGREGLUTÍÐINDI
*Stefan í Skorini*

Vegna hálu vegirnar hevur løgreglan havt fleiri ferðsluóhapp at taka sær av um vikuskiftið. Mánanáttina vórðu fleiri bilførarar tiknir á bóli, tá kavi bráðliga legðist.

Ein bilur mundi enda inni í gomlu Køkubúðini, tá hann fór á glið. Bilurin koyrir omaneftir Jóannesar Paturssongargøtu, tá førarin missir tamarhaldið á bilinum, sum fyrst stoytir á eitt skelti á gongubreytini og síðani fer inn í hurðina á Køkubúðini.

Fleiri onnur ferðsluóhapp vóru eisini at siga frá um vikuskiftið. Hetta vóru brot á ta treytaleysu víkiskylduna, sum kann geva føraranum treytaða frádøming av koyrikortinum.

Leygardagin var ein samanstoytur við trimum innblandaðum bilum í Bøkjarabrekku. Ein bilur, sum koyrir niðaneftir Bøkjarabrekku, roynir at sleppa undan samanstoyti við ein bil, ið koyrir út frá Tinghúsvegnum. Bilurin, ið koyrir niðaneftir, fer tí yvir í hina farbreytina, har ein bilur er á veg omaneftir. Hesir stoyta saman, og stórur materiellur skaði stóðst.

Annars siga allar løgreglustøðirnar kring landið frá einum sera friðarligum vikuskifti, har lítið og einki er at siga frá.



*Førarin misti tamarhaldið á hesum bilinum, tá hann koyrdi omaneftir Jóannesar Paturssonargøtu sunnukvøldið. Bilurin mundi enda inni í Køkubúðini*

*Mynd: Eirikur Lindenskov*



Vikuskiftisferð til Keypmannahavnar

hósdag til sunnudag ella fríggjadag til mánadag
21/02 - 25/02, 25/02 - 4/03 og 07/03 - 11/03

Unna tær eina fríløtu í Keypmannahavn. Eitt vikuskifti har tú tekur tær av løttum, spákar ein túr á "Stroynum" ella fært tær ein góðan bita í Nýhavnini.

**Íroknað er** flogferð, ferðaavgjøld og innivist á Hotel Du Nord í 3 nætur við morgunmati.

Fráferð úr Vágum hósdag ella fríggjadag. Fráferð úr Keypmannahavn sunnudag ella mánadag.

3.325,-
Prísur fyri hvønn í dupultkamari

4.090,-
Prísur fyri hvønn í einkultkamari

**Hotel Du Nord**
Hotel Du Nord liggur mitt í Keypmannahavn, 110 m frá Høvuðsjarnbreytastøðini, og tætt við Ráðhúsplássið, Strøget, Tivoli.

SANSIR · TEL 355 355

Bílegg hjá tínari ferðaskrivstovu ella hjá Atlantic Airways

ATLANTIC AIRWAYS
Flogvøllurin · FO-380 Sørvágur
Tel: 34 10 40 · Fax 34 10 01 · booking@atlantic.fo
www.atlantic.fo